**Viðmerkingar til einstakar greinar/partar av uppskotinum til løgtingslóg um broyting í Elveitingarlógini, løgtingsmál 112/2018**

***Til broyting nr. 5, § 8b, stk. 1***
Markið á 1/3 er sambært ásetingini galdandi fyri rættindahavarar, sum hava ræði á meira enn 1/3 av framleiðsluni inn á netið.

Fyri greidleika skuld eigur í viðmerkingunum at framganga, at markið er í mun til tá søkt verður, og ikki í mun til framleiðsluna eftir, at umsókn er játtað. Annars vil avleiðingin vera, at egin umsókn verður ein forðing og hetta vil vera stór/inntrivandi avmarking.

***Til broyting nr. 5, § 8b, stk. 3***
Sambært § 8b, stk. 3, kann virksemi hjá tí, sum hevur rokkið markinum fyri miðsavnan bara økjast á ein hátt, nevniliga við at vinna útboð, sum tað almenna skipar fyri (sí broyting nr. 2, § 5, stk. 2).

Viðmerkingarnar til § 8b, stk. 3, siga hetta ikki staðiliga, men fyri greidleika skuld eigur har at framganga, at tá markið fyri miðsavnan er rokkið, og einasti háttur at vaksa meira tá er við at vinna útboð á ávísan hátt, so ber ikki til at fáa fleiri rættindi við at lata inn umsókn undir open-door mannagongdini í § 5, stk. 3. Hetta er tí, at ber tað til, so er í roynd og veru onki mark, og tað vil vera í andsøgn við bæði endamálið og ætlanina við markinum.

***Til broyting nr. 6, § 9, stk. 5***
Tað má metast at liggja í almennu viðmerkingunum til uppskotið (um, at lógarbroytingin onki broytir *í* mun til, at trivið verður ikki inn í avtalur v.m. hjá framleiðarum ella øðrum, men at uppskotið *í* øllum virðir givin loyvi og gjørdar avtalur millum framleiðarar og onnur), at Netfelagið kemur *í* staðin fyri netfelagið hjá SEV.

Her er helst kortini viðkomandi at nágreina, at tey framleiðsluloyvi, sum eru givin og sum fara at verða givin, eru grundað á ein sølupris fyri framleiðsluna, og er hetta eisini avtalað nærri við netfelagið/SEV í serligum avtalum. Tí má vera greitt eftir uppskotinum, at tá Netfelagið verður skipað sambært ásetingum í lógini pr. 1. januar 2020, so er tað Netfelagið bundið av higartil gjørdum prísavtalum v.m. við framleiðarar og inntraðkar sum partur, har SEV áður var partur.